







# 6 tvíhús á Heygnum Mikla, Tórshavn

Talan er um 6 tvíhús, sum eru í gerð. Herav eru 4 seld og sostatt eru 2 eftir. Hesi verða seld sum innilokað og verða gjørd 100% liðug uttan við altan, trappu, vindeygum, taki og takrennum. Innan verða gólvplátur, 19 mm krossfiner, lagdar á undirsløgini, bæði miðhædd og loft. Útveggir verður ráur stórviður. Brandtrygging verður gjørd sambært galdandi lóg, t.v.s. at bjálvað verður við brandbats 1 m frá brandvegginum og lukkað verður við gipsi.

Keyparin hevur møguleika fyri at keypa ein tilfarspakka fyri kr. 130.000,-. Við øllum tilfarinum á tilfarslistanum ber til at smíða loft og miðhædd sambært tekning umframt kjallararúm. Trappa fylgir ikki við.

Tó kanst tú velja at fáa húsini lykklaklár (uttan tapet og máling) til ein kostnað á kr. 2.500.000.

Á Heygnum Mikla er barnavinarligt og friðarligt. Tvíhúsini standa beint út til eitt fríøki. Her er gott bæði hjá ungum sum eldri at búgva. Fleiri vøggustovur og barnagarðar eru í umhvørvinum. Venjingarskúlin, Læraraskúlin, Handilsskúlin og Tekniski Skúlin eru bert fáar minuttir frá og góðir innkeypsmøguleikar eru.

Samstundis er stutt til miðbýin, har tú hevur møguleika fyri at njóta alt, sum miðbýurin hevur at bjóða við hugnaligum matstovum, mentanarlívi, søvnum og handlum.

Tú fært meira at vita um tvíhúsini við at ringja til Skyn á tlf. 35 74 00.

**Fakta:**

| | |
|---|---|
| Add. | á Heygnum Mikla, Tórshavn |
| Byggiár: | 2008 |
| Hæddir: | tríggjar |
| Stødd innan: | 184 fermetrar |
| Grundøkið: | 300 fermetrar |
| Prísur: | 1.980.0000 |

skyn

**Tlf. 357400 · Tórsgøta 16 · www.skyn.fo**